# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



## Føðingar



*20. september fingu Barbara Mortensen og Mortan Kronbor Jacobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4750 gr.*

21. august fingu Julianna og Jóhan Sjóstein, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3850 gr.

5. sept. 2010 fingu Bára á Lag og Sylvain Codron, Keypmannahavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4260 gr.

21. september fingu Alina og Eivind Jacobsen, Strondum, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3500 gr.

21. september fekk Elin-Margreta Nolsøe Jacobsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 43 cm long og vigaði 1630 gr.

22. september fingu Eva Johanna Garðshorn og Jógvan Hansen, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3220 gr.

23. september fingu Asta Magnussen og Kári Nielsen, Argjum, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3500 gr.

23. september fingu Sigrun Egholm og Carsten Larsen, Streymnesi, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3100 gr.

23. september fingu Jenny Petersen og Magnus Samuelsen, Norðskála, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3370 gr.

24. september fingu Arngerð Diana Hansen og Jan Joensen, Argjum, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3800 gr.

24. septembur fingu Súsanna og Niels Thomsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3210 gr.

26. september fingu Patricia Samuelsen og Johannes Andrasson Arge, Argjum, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4325 gr.

27. september fingu Solveig Olsen, Vestmanna, og Jákup Petersen, Kaldbaksbotnur, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3400 gr.

28. september fingu Annika P. Árting og Bárður Andreassen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 2775 gr.

# Prestaskifti í Adventistakirkjuni

Leygardagin verður fráfaringargudstænasta í Adventistakirkjuni í samband við at Jens Vilhelm Danielsen leggur frá sær sum prestur og Allan Falk tekur yvir.

Eftir 27 ár sum prestur í Adventistakirkjuni í Havn leggur Jens Vilhelm Danielsen frá sær tann 1. oktober. Hann hevur verið prestur í Føroyum síðani 4. januar 1984. Fráfaringargudstænasta verður 2. oktober kl. 11 í Adventkirkjuni, har tann nýggi presturin, Allan Falk verður hjástaddur.

Aftan á lokna útbúgving í Danmark, Onglandi og USA og eitt styttri skeið sum prestur í Danmark kom Jens Vilhelm til Føroyar sum prestur. Hetta bleiv eitt longri skeið enn vanligt sum prestur á sama stað.

Umstøðurnar at virka sum prestur og kirkja broyttust, tá ið sjónvarpið byrjaði sínar sendingar. Samarbeiðið millum samkomur hevur ment seg rættuliga nógv hetta tíðarskeiði sum t.d. við felagskirkjuligum tiltøkum, sigur Jens Vilhelm Danielsen, ið flytur til Íslands, ið er heimlandið hjá konuni Sonju, sum hevur verið lærari í Adventistaskúlanum í 25 ár.

Nýggi presturin, Allan Falk, fer ikki at hava fastan bústað í Føroyum, men kemur røkja starvið saman við sínum prestastarvi í Danmark.



*Allan Falk loysir Jens Vilhelm Danielsen av sum prestur í Adventistakirkjuni*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Finleif í Smiðjuni

**Fríggjardagin 1. oktober kl. 16 - 20 letur ein listaframsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík. Tað er Finleif Mortensen av Argjum sum sýnir fram**

Við á framsýningini eru 25 expressionistiskir málningar við útgangsstøði í bygdini og Havnini. Málningarnar skulu ikki endurgeva støðini, men eru heldur spæl í litum og kompositiónum. Málningarnar eru málaðir við fagrum litum og glaðum litum.

Tað eru í ár júst 25 ár síðani, at Finleif hevði sína fyrstu framsýning, hon var eisini í Smiðjuni. Síðan tá hevur hann havt fleri einstaklingaframsýningar og luttikið á framsýningum eitt nú Ólavsøku- og Várframsýningini. Seinastu seks árini hevur Finleif sýnt fram í Danmark og Íslandi, umframt at hann hevur luttikið á listamessum m.a ART-Copenhagen og ART-Herning, sum eru tær stóru listamessurnar í Norðurlondum

Á framsýningini eru eisini tveir skulpturar ella rættari model ella hugskot til skulpturar. Framsýningin er opin til týsdagin 5. okt. Opið er gerðandisdagar kl. 10 – 19 og sunnudagin kl. 14 – 19.



*Listamaðurin Finleif Mortensen í Smiðjuni*
*Mynd: Jens Kristian Vang*